TING-HELLAN

# fólkatingsvalinum




*Tað tykist vónleyst at spáa, hvussu endaliga úrslitið av fólkatingsvalinum verður. Sunnukvøldið gjørdu flokkarnir seinastu royndirnar at flyta – kanska avgerandi atkvøðurnar*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

og Helena Dam á Neystabø kappast um annað plássið, sum ber fólkatingsumboðan við sær, um tað í dag gongst Javnaðarflokkinum, sum Gallup kanningin vísti. Í 2001 fekk núverandi løgmaður og táverandi fólkatingsmaðurin hjá Javnaðarflokkinum 60 prosent av samlaða atkvøðutalinum hjá flokkinum. Um løgmaður fer at fáa sama partin hesa ferð, so er grundarlagið undir rokningini, sum gevur øllum hinum 25 valevnunum og listanum 40 prosent av atkvøðunum 65-70 svar í kanningini. Tað er rættuliga lítið grundarlag, men útmeldingin kann ivaleyst bera við sær, at síðani sunnudagin eru javnaðaratkvøður fluttar frá øðrum og til Helenu Dam á Neystabø og John Johannesen.

**Anfinn bjóðar Óla av**

Sambært kanningini hjá Gallup bendir alt á, at talan verður um tætt stríð um fremsta plássið hjá Fólkaflokkinum. Fyrrverandi løgmaður, Anfinn Kallsberg, er á odda, men Gallup sigur, at munurin er rættuliga lítil aftur til Óla Breckmann, sum var fólkatingsmaður frá 10. januar í 1984 og fram til 20. november í 2001.

Á fólkafloklistanum eru 22 valevni, men tað kemur ikki óvart á, at tað bara snýr seg um Anfinn og Óla. Á valinum í 2001 fekk Óli Breckmann 2.329 persónligar atkvøður, og 1.537 atkvøddu fyri Anfinni Kallsberg.

Hesir báðir, Anfinn Kallsberg og Óli Breckmann, hava seinastu mongu árini verið fólkafloksprofilarnir, og á fólkatingsvalinum í 2001 fingu teir tilsaman 71 prosent av samlaða atkvøðutalinum hjá flokkinum.

Spurningurin hevur fleiri ferðir verið umrøddur, hvørjir verða teir næstu, sum fara at mynda Fólkaflokkin. Fólkatingsvalið hevur einki við tann spurningin at gera, men sjálvandi fer tað at verða fylgt væl við, hvussu formaðurin í tingbólkinum seinasta árið, Jørgen Niclasen, og landsstýrismenninir í yngra ættarliðnum, Bjarni Djurholm og Jógvan á Lakjuni, fara at standa seg í innanhýsis kapping. Teir vóru allir á listanum í 2001. Bjarni Djurholm fekk 188, Jógvan á Lakjuni 199 og Jørgen Niclasen 92 persónligar atkvøður.

**Elddópurin hjá Kaj Leo**

Á løgtingsvalinum 20. januar í 2004 tapti Sambandsflokkurin. Lisbeth L. Petersen, sum er einasta føroyska kvinna, ið er vald á fólkating, tók seg aftur sum formann, og hon er ikki á listanum í dag. Harvið ganga, sum tað plagar at verða tikið til, 2.288 persónligar atkvøður hjá fyrrverandi formanninum og fólkatingsmanninum hjá Sambandsflokkinum leysar.

Fólkatingsvalið er tað fyrsta, síðani Kaj Leo Johannesen gjørdist floksformaður. Formanssessurin hevur borið við sær, at Kaj Leo hevur verið fremsti sambandsmaðurin í valstríðnum. Hann hevur verið tann, sum hevur fingið mest tíð í útvarpinum og sjónvarpinum, og hann hevur átt myndina á nógvum av lýsingunum, sum flokkurin hevur havt undan valinum.

Í dag verður nýggi sambandsformaðurin lagdur á vektina hjá veljarunum. Sambært Gallup so stendur kappingin í Sambandsflokkinum um fremsta plássið og harvið møguligan fólkatingssess millum Kaj Leo Johannesen og Edmund Joensen. Fyrrverandi løgmaðurin og fyrrverandi fólkatingsmaðurin og núverandi løgtingsformaðurin fekk í 2001 955 persónligar atkvøður og varð harvið eykamaður hjá Lisbeth L. Petersen. Kaj Leo Johannesen bjóðaði seg fram í 2001, og tá stuðlaðu 316 honum. Umframt Lisbeth og Edmund fekk eisini Alfred Olsen (486) fleiri persónligar atkvøður enn nýggi sambandsformaðurin.

Tað er neyvan ivi um, at persónliga atkvøðutalið hjá Kaj Leo Johannesen fer at fjølgast og kanska fleirfaldast. Men um tað ikki fer at røkka til trygt fyrsta pláss á listanum, so fer formaðurin ikki at verða mettur at vera serliga tungur í sessinum.

**Veljarakanning**

Í síðstu viku hevði ABC samgongan eitt ára føðingardag. Serliga smáu flokkarnir plaga í sambandi við fólkatingsval at minna á, at tað er ikki rætt at sammeta fólkatingval við, hvussu úrslitið og harvið tingmannabýtið hevði havt verið, um talan hevði verið um løgtingsval. Kortini er tað ein veruleiki, at burtursæð frá sjálvum løgtingsvalinum, so finst tað eingin betri veljarakanning og vekt at viga samgonguna og allar flokkarnar á, enn fólkatingsvalið er tað.

Eina ferð áður er tað komið fyri, at tríggir stórir flokkar hava verið saman í samgongu. ACE skipaðu samgongu eftir valið í 1974, og teir skipaðu aftur samgongu eftir valið í 1978. Tann samgongan skrædnaði í 1980.

Sjeyti árini vóru eitt nú eyðkend av, at tað vóru fólkatingsval annað hvørt ár. Fólkatingsval var 9. januar í 1975 ella tveir dagar frammanundan, at fyrra ACE landsstýrið varð skipað. Á tí valinum vunnu Javnðarflokkurin (Johan Nielsen) og Tjóðveldisflokkurin (Erlendur Patursson) fólkatingssessirnar.

Næsta valið var 1. mars í 1977. Tá hevði Sambandsflokkurin verið einasti stóri andstøðuflokkurin í góð tvey ár. Pauli Ellefsen var ágangandi andstøðuleiðari, og tað sást eitt nú aftur í úrslitunum á fólkatingsvalunum í 1977 og aftur 23. oktober í 1979. Á báðum valunum vunnu Sambandsflokkurin og Pauli Ellefsen fyrra føroyska umboðið á Christiansborg, meðan flokkurin hjá løgmanni vann hitt umboðið. Fyrru ferðina var tað Johan Nielsen, og seinnu ferðina var tað Jacob Lindenskov.

Um úrslitið í dag verður, sum Gallup kanningin vísti, so fara flokkurin hjá løgmanni og stóri andstøðuflokkurin at vinna fólkatingssessirnar. Men nú fæst at síggja. Kanningin varð gjørd í síðstu viku - frá týskvøldinum og til leygarkvøldið. Tað var ikki fyrrenn í síðstu viku, at eitt sindur av ferð kom á valstríðið, og tað hevði verið heilt at undirmett alt tosið og alla skrivingina og ringingina og smsingina hjá flokkunum og serliga einstøku valevnunum, um royndirnar at ávirka ikki høvdu borið onkrar flytingar við sær. Sambært Gallup kanningini nýtast flytingarnar ikki at verða so stórar, áðrenn tað fer at síggjast aftur í úrslitinum.

Men uttan mun til hvussu úrslitið fer at laga seg, so fer tað at verða vigað og kannað innanhýsis í flokkunum og millum politikararnar, og nógvir sigrar og nógv tap, sum tað ikki fer at verða fokuserað upp á í kvøld, fara næstu dagarnar at daga fram í politiska umhvørvinum.